Friggjadagur
24. januar 1997


hygg & hoyr

8 síður at taka úr

Thorben Johannesen:

Prestur við uppaling sum hjástarv

– Vónandi hevur onkur hug til at gera sendingarnar, aftaná at eg eri givin, tí tað er brúk fyri henni, sigur Thorben Johannesen, sum gevst við Skúli og uppaling, tá ið vetrarsskráin endar. – Aftaná 60 sendingar følir tú teg eitt sindur „tóman", sigur Thorben, sum hevur prestastarv niðri í Danmark



Tað er sera spennandi at gera sendingarnar, men tað er ov tíðarkrevjandi, sigur Thorben Johannesen, sum skjótt hevur gjørt 60 sendingar við heitinum Skúli og uppaling.

MAGNUS DAM

Hvørja viku sita ein rúgva av fólki framman fyri lurtitólið og lurta at sendingini Skúli og uppaling, sum Thorben Johannesen seinastu tveir vetrarnar hevur tikið sær av.

Tú hoyrir tað ikki á ljóðgóðskuni, men sendingarnar, sum hava verið í vetur, eru allar gjørdar niðri í Danmark. Thorben ger sendingarnar í Aalborg Radio, og gjøgnum telefonina verða tær sendar til Útvarp Føroya, sum so aftur sendir tær út í luftina til føroysku lurtararnir. Til nakrar av sendingunum hevur verið nýttur ein teknikkur, sum nevninst ISDN, ið er ein telefonlinja, sum hevur so góða ljóðgóðsku, at tú ikki hoyrir, at tosa verður ígjøgnum eina telefon.

Hetta er ein sera góður teknikkur, men Thorben er sjálvur eitt sindur ivasamur. Ikki í teknikkinum, men í tí at hann ger sendingarnar niðri í Danmark, og í tí at hann hevur eitt starv, sum skal røkjast eisini.

– Tá ið tú hevur eitt fulltíðarstarv, er tað torført at fáa tíðina til at røkka til eisini at gera útvarpssendingar, og følingin við viðurskiftini í Føroyum er eisini minni, tá ið tú býrt niðri í Danmark.

Har hevur Thorben búð seinasta hálva árið, og við síðuna av starvinum sum prestur, hevur hann gjørt sendingarnar.

– Eg royni at fylgja við í, hvat hendir í Føroyum, og eg lesi tey bløðini, eg fái hendur á, men tað er ikki tað sama, sigur hann.

– Soleiðis, sum eg sjálvur hoyri sendingarnar, so haldi eg ikki, at tær í vetur hava verið líka góðar sum seinasta vetur, tá ið eg búði í Føroyum, sigur hann.

– Tær hava verið av einum øðrvísi slagi í vetur. Eg havi gjørt meira við at upplýsa um nakrar skúlatankar, sum eru meira alment galdandi, sum til dømis um Rudolf Steiner skúlarnir. Eingir tílíkir skúlar eru í Føroyum, men tað er sovorðið, sum lærarar vita hvat er, og onkur foreldur hugsa kanska eisini um, hvat tað er.

At sendingarnar verða gjørdar niðri hevur bæði sína styrki og sínar veikleikar, heldur Thorben. Skulu vit samanbera okkum við nakra skúlaskipan, so má tað vera tann danska, heldur hann. Men samstundis heldur hann tað vera eitt sindur óheppið fyri sendingarnar, at tær ikki í nóg stóran mun hava støði føroyskum viðuskiftum.

Thorben ætlar sær orsakað av tí at hann býr í Danmark og hevur eitt annað starv, ikki at halda áfram við at gera sendingarnar næsta vetur.

– Tá ið tú hevur gjørt umleið 60 sendingar, so følir tú teg eitt sindur „tóman". Tá er tað eitt sindur torført at fáa nýggj hugskot til sendingar, og eg seti meg ikki føran fyri at halda áfram.

Tað er tó ikki bara Thorben, sum fær hugskotini til sendingarnar. Hann fær javnan brøv frá lurtarum, sum siga sína hugsan um sendingarnar, og fleiri koma eisini við hugskotum ella ynskjum um evni, tey kundu hugsað sær vóru viðgjørd í sendingini.

Thorben vónar, at sendingin heldur áfram eisini aftaná, at hann er givin.

– Eg vóni, at onkur annar hevur hug til at taka yvir, tí einki er at ivast í, at tað er neyðugt at hava ein tílíka sending. Tað er neyðugt við meiri orðaskifti um skúla og uppaling enn tað hevur verið. Og eg vóni eisini, at sendingarnar hava gjørt, at meira hevur verið prátað um spurningar, sum viðvíkja skúlaviðurskiftum.

Við ein møguligan avloysara kann Thorben siga, at tað er spennandi at gera sendingarnar. Hann heldur eisini, at nógv av teimum evnunum, sum hann sjálvur hevur viðgjørt, kunnu takast fram aftur og viðgerast av nýggjum ella frá eini aðrari síðu.

Ein møguligur avloysari skal tó vita, at tað er tíðarkrevjandi at gera tann hálva tíman, sendingin varir. Thorben brúkar minst ein dag um hvørja sending.

Thorben, sum er útbúgvin lærari, býr í lítla býnum Klim í Norðurjútlandi, og har starvast hann sum prestur í einum vælkirkjuliði. Eitt valkirkjulið er ein kirkja, sum hevur tilknýti til fólkakirkjuna og byggir á somu læru. Munurin er tó, at limirnir ráða meiri sjálvi, og tey gera sjálvi av, hvør skal vera prestur í kirkjuni. Thorben, og harafturat skipar kirkjuliðið eisini fyri fyrilestrum og øðrum tiltøkum fyri limunum.

Thorben hevur ongar ætlanir um at flyta heimaftur til Føroya enn, men tey, sum dáma væl sendingarnar hjá honum, kunnu síggja fram til at umleið 15 sendingar eru eftir enn.



Loftmiðlarnir

Útvarps- og sjónvarpsummæli



Hvør drap hvønn?

Sjónvarp Føroya gevur í hesum døgum hyggjarum sínum eina trupla roynd, ja, eina so trupla, at sjálvt mest garvaði krimihyggjarin má geva upp.

Øll vit at SvF – av tí at DR altíð hevur havt tað – hevur havt alsk til enskar krimirøðir, og tað er eitt ótal av slíkum sendar gjøgnum ár og dag.

Tað er einki galið í tí, tí ofta eru hesar frálíkar. og á heilt øðrum støði enn amerikansk krimiprojekt.

Ein av teimum mest populeru á hesum økinum man vera enski Dalglish, sum í hesum døgum hevur sína føstu senditíð seint leygarkvøld og enn eru fýra partar eftir av hesi sendirøð, sum teir rópa *Við listum og snildum.*

Royndin, sum hyggjarnarir vera settir út fyri, er ikki, at hendan røðini, ella onkur onnur við, verður send so seint á kvøldinum, og heldur ikki at tær eru ov spennandi ella ógvusligar.

Stóra royndin er, at SvF sendur fýra enskar krimirøðir hvørt um annað, og so er stóra royndin: Hvør drap hvønn?

Stundum halda hyggjarar seg síggja teir skeivu persónarnar í teimum ymsum raðsendingunum, og tá alt kemur til alt er trupult at halda skil á hvør er undir illgruna hjá Dalglish, hvør er tað hjá Cracker og hvør er tað hjá hinum.

Í løtuni sendir SvF *Slongan og knívurin* mikukvøld, *Morðgáturnar hjá Bain* hóskvøld, Cracker fríggjakvøld og Dalglish leygarkvøld.

Og tær ensku røðirnar eru ikki so ymiskar, at tað ber til at síggja greiðan mun á teimum øllum.

Tað munnu ikki vera so fáir hyggjarar, sum hava ilt við at halda skil og skilnað millum tær ymsu røðirnar, og hjá onkrum gerast hesar ensku krimirøðirnar til ein stóran velling.

Hvør drap hvønn?

Kvøldarstundin hevur verið fastur táttur í vetrarskránni hjá ÚF hesaferð, og tað má sigast, at hóast hon byggir á endursendingar frá morgninum, so hevur hon fingið sítt rættvísa pláss í skránni.

Kanská er tað tí, at vertsurin, Jónheðin Tóndheim, dugir væl at blanda tónleikin, hann spælir, og ofta spælir frálíka góða tónleik.

Kvøldarstundin varðar ein heilan tíma, men tað er ein góð blanding av innsløgum og tónleiki, og so ger tað sendingina heldur ikki verri, at tú sleppur undan einum ávísum verti frá morgunsendingini.

Fimmarin var aftur í luftini mikudagin, og orðið var frítt.

Tað var ikki sørt hugaligt at hoyra, at tað vóru fólk sum funnist, at umfatandi tíðindunum um Boris Jeltsin, nær hann er sjúkur, nær væntað verður at hann sleppur heim, og nær hann veruliga kemur heim.

Sjálvandi er støðan í Russlandi eitt álvarsmál, og partur av henni er sanniliga eisini heilsustøðan hjá Jeltsin, men tað man neyvan vera neyðugt við updatering av støðuni hjá forsetanum hvønn tíma, tað áttu at vera onnur tíðindi at tikið við í staðin – ið hvussu er við annanhvønn tíma...

Eyðun Klakkstein